## Føroya Sjósavn á er opið á ólavsøku



Um vikuskiftinum og á ólavsøku hevur sjósavnið á Argjum opið frá klokkan 14 til 18. Sum nakað nýtt verður í ár eisini sýnt fram eitt firvaldasavn. Hans Eli Sivertsen á Argjum hevur verið so beinasamur at lánt Sjósavninum hetta einastandi savn, sum vísir øll tey umleið 150 firvaldasløgini sum eru skrásett í Føroyum. Eisini verður høvi at síggja tann heldur sjáldsama multufiskin. Fyrst í juni skaffaðu miðvingar sjósavninum 18 "pusalaknektar", sum hesin fiskurin eisini kallast. Fáir føroyingar hava sæð hendan vælvaksna summargestin, m. a. tí, at hann sjáldan tekur húk. Hann livir stórt sæð vegetariskt.

# Eik Banki við reyðum tølum

**Eik Banki hevur hall fyrra hálvár. Úrslitið er 15,4 milliónir krónur skeiva vegin. Sama tíðarskeið í fjør hevði Eik eitt yvirskot á 237,4 millinónir krónur. Men hóast hallið roknar Eik við einum ársúrsliti á 335 milliónir krónur**

BÚSKAPUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Marner Jacobsen, stjóri í Eik Banka*

Eik Banki hevði fyrstu seks mánaðirnar í ár eitt undirskot á góðar 16 milliónir krónur eftir skatt. Tað staðfestir hálvársroknskapurin hjá bankanum, sum varð almannakunngjørdur fyrrapartin í gjár.

Til samanberingar hevði Eik Banki 206 milliónir krónur í yvirskoti fyrra hálvár í fjør, eisini eftir skatt.

Tað eru serliga partabrøvini, sum Eik Banki eigur, ið draga hálvársúrslitið niður. Meðan Eik fyrra hálvár hevði 40 milliónir í yvirskoti av sínum virðis- og partabrøvum, so gav hesin postur heili 146 milliónir krónur í undirskoti.

Rás2 hevði í gjár stjóran í Eik Banka á orði, og hann segði soleiðis:

– Vit eru raktir av partabrævamarknaðirnir kring allan heimin eru falnir, og tað sæst so aftur í at hava hesir ognirnar í Atlantic Petroleum og Spron.

### Mong ár síðani síðst

Tað eru við at vera mong ár síðani, at Eik hevur havt hall hálvársroknskapi sínum. Í Rás2 var Marner Jacobsen spurdur, hvussu reyðu tølini á botnlinjuni skulu tulkast.

– Nú skulu vit ikki leggja meiri í tað enn tað er, segði Marner Jacobsen og minti á, at talan bert er um hálvársroknskap.

– Tað kann nógv henda gjøgnum eitt ár, og vit hava skula tikið eitt søguliga stórt kursfall upp á seks mánaðir. Men vit hava eina sunna drift, vit hava nøkur sunn útlán og lutfalsliga smáar burturleggingar, so útlitini hjá okkum eru góð, men her og nú mugu vit so taka nøkur kurstap upp á partabrøv okkara, staðfesti Marner Jacobsen.

### Roknar við ársyvirskoti

Eik Banki er skrásettur á keypsskálunum, og Marner Jacobsen varð spurdur um tað kundi fáa nakran sálarligan týdning, at bankin nú kemur við negativum hálvársroknskapi. Til tað svaraði stjórin í Eik Banka, at hann trúi at partaeigararnir vóru nóg klókir, sum Marner Jacobsen málbær seg, til at síggja afturum reyðu tølini.

– Tí eg meti at hetta er eitt tekin um, at vit eru ein sterkur banki við góðum likviditeti og driftsvánum, segði Marner Jacobsen, sum eisini er bjartskygdur fyri ársroknskapin.

– Vit vænta at úrslitið áðrenn burturleggingar, kursjavning og skatt verður 335 milliónir krónur. Tað er tað sama, vit væntaðu við ársbyrjan, so í so máta er einki broytt, vísti Marner Jacobsen á.

Men bankin skal við árslok eisini geva upp kursvinning ella kurstap, men her er Marner Jacobsen minni bjartskygdur. – Um tú spurdi meg við ársbyrjan, so hevði eg ivast í, at kursurin fór at falla so nógv. Nú vóni eg, at botnurin er náddur, men eg tori ikki at geva nakað boð upp á tað, svaraði stjórin í Eik Banka til tann spurningin.

# Føroya Vísindaráð sett

**Føroya Vísindaráð skal orða tann yvirskipaða strategiska granskingarpolitikkin, sum við felags hugsjón fevnir um gransking, menning og nýskapan**

POLITIKKUR
Tíðindaskriv

Í yvirskipaða granskingarpolitikkinum er ætlanin at serlig høvuðsøki verða raðfest fyri eitt ávíst tíðarskeið samstundis sum fíggjarligu íløgurnar fylgja við. Vísindaráðið er mannað við landsstýrisfólkunum, umboð úr vísindaliga umhvørvinum og vinnuni. Hetta fyri at fáa størst møguligt samband millum vinnulívið og yvirskipaða granskingarpolitikkin.

### Limirnir í Vísindaráðnum eru:

løgmaður, Jóannes Eidesgaard
landsstýriskvinnan í granskingarmálum, Kristina Háfoss
landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Høgni Hoydal
landsstýriskvinnan í vinnumálum, Bjørt Samuelsen
landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen
landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, Tórbjørn Jacobsen
landsstýriskvinnan í løgmálum, Helena Dam á Neystabø
landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm

**Harumframt hevur Kristina Háfoss, landsstýriskvinna, tilnevnt hesar limir í Vísindaráðið:**

Bergur Poulsen, stjóri
Malan Marnersdóttir, professari, dr.phil. & Ph.D.
Jan Arge Jacobsen, Dr. Scient.
Marjun Patursson, bókavørður.
Erland Viberg Joensen, Ph.D.

**Sambært lógini kann løgmaður eisini tilnevna tveir limir, og hesir eru:**

Hermann Oskarsson, stjóra
Sjúrð F. Olsen, Ph.D. og dr.med.

Løgmaður er formaður, og landsstýriskvinnan í granskingarmálum er næstformaður. Formaðurin í Granskingarnevndini hevur møtiskyldu í Vísindaráðnum. Stjórin fyri Granskingargrunnin er skrivari Vísindaráðsins.

Við skipanini av Føroya Vísindaráði eru umráðandi stig tikin til, at fáa eitt týðandi strategisk samfelagsmenningaramboð. Saman við Granskingarnevndini skal Vísindaráðið tryggja eina effektiva íløgu, ið framleiðir hágóðskuvitan á altjóða stigi til gagns fyri samfelagið, har dentur serliga verður lagdur á øki, har vit hava serligan førleika og tilfeingi at gera rannsóknir og veruliga kunnu gera okkum galdandi á altjóða støði.